





# Føroyar – úr eystri í vest

GONGURTÚRUR
*Solby A. Eliasen*

Aftur í ár skipar Kunningarstovan í Havn saman við hinum økisfeløgunum fyri einum gongutúri kring oyggjarnar. Í fjør og fyrra árið var tað Føroyar úr suðuri í norð, men í ár verður tað úr eystri í vest

Farið verður út til Fugloyar leygarmorgunin. Og so byrjar gongurtúrurin, sum endar úti í Mykineshólminum.

Kjartan Christiansen, ferðaleiðari á gongutúrinum, sigur, at undirtøkan hevur verið góð bæði tey undanfarnu árini, so tað verður hon væntandi eisini í ár.

- Talan er um eitt sera sosialt tiltak, tað verður prátað nógv og tað er sera hugnaligt, sigur Kjartan Christiansen. Hann leggur afturat, at tann longsti teinurin, sum verður gingin út í eitt er 15 kilometrar. Men tað er ikki at forsmáa, tí tað er nógv upp og niður, so tað kann tykjast strævið til tíðir.

Hann greiðir eisini frá, at á túrinum fyrsta árið, vóru tað mest føroyingar við, meðan tað í fjør ikki vóru so nógvir føroyingar.

- Eg veit ikki, um orsøkin til tað kann vera, at í fjør var eitt stórt enskt ferðalið við á túrinum, og onkrir føroyingar av tí orsøk hildu seg aftur. Hetta er sum nevnt eitt sosialt tiltak, har tað verður prátað nógv. So tað kann vera, at onkur helt seg aftur, tí tað var neyðugt at tosa enskt, sigur Kjartan.

Gongutúrarnir hini bæði árini vóru úr Akrabergi til Enniberg.

# Tombola í neystinum hjá Klaksvíkar Róðrarfelag

TOMBOLA
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Leygarmorgunin klokkan tíggju verður eitt tombola og kafé í sjálvum bátaneystinum hjá Klaksvíkar Róðrarfelag. Tað er ein partur av ”old girls” manningini, sum stendur fyri hesum tiltaki. Hetta er ein roynd at fáa ein part av mistari inntøku innaftur

- Vit hava tikið stig til hetta tiltak sum eina roynd at fáa ein part av mistari inntøku hjá felagnum innaftur, sigur ein av manningini, Petrina Venned, sum sipar til, at Norðoyastevnan í ár var ein heilkiksari, tá tað ræður um inntøku hjá Klaksvíkar Róðrarfelag.

Tiltakið í neystinum byrjar, sum sagt, klokkan tíggju leygarmorgunin, og høvi verður hjá fólki, umframt at vitja tombolaið, eisini at hugna sær við einum kaffimunni og onkrum afturvið. Tí ætlanin er, at ein kafé eisini skal verða har. Um viðrar verða stólar og borð sett uttanfyri, um ikki, so verður kaféin inni í bátaneystinum.

Petrina og hini, sum skipa fyri hesum tiltaki, vóna sjálvsagt, at fólk fara at taka væl undir við tiltakinum. Men tey vita eisini, at leygardagin spæla Danmark og Argentina áttandapartsfinalu í HM, so tá verða gøturnar helst manntómar.

- Men vit vóna tað besta, kortini, sigur Petrina, og leggur aftur at, at tað eru ikki øll, sum eru so vill eftir fótbólti.

Ætlanin er eisini, at um tombolaið ikki er liðugt, tá kappróðurin á Eystanstevnu byrjar, so kunnu fólk sita niðri í neystinum og lurta.

- So meðan rógvararnir gera sína skyldu úti á Skálafirðinum, fara vit at royna at geva felagnum eina hjálpandi hond her, sigur Petrina.

Tað er ongin loyna, at Norðoyastevnan var onki fíggjarligt kupp hjá Klaksvíkar Róðrarfelag í ár, so umframt hetta tiltakið hava rógvararnir eisini selt lutaseðlar, sum verða drignir leygarkvøldið, tá rógvararnir eru komnir aftur til Klaksvíkar.

---

†

Kunngjørt verður hervið fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, sonur, beiggi, svigarsonur og svágur okkara

**Alf Sørensen**
**Miðvági**

andaðist í Keypmannahavn sunnudagin
50 ára gamal.
Kistan kemur við flogfarinum sunnudagin
uml. kl. 11.00.
Jarðarferðin verður mánadagin kl. 13.00
av Ellisheiminum.

*Fyri tey avvarðandi*
**Jóhanna, Ernst og Betsy**

Tey, ið vilja minnast Alf, kunnu lata eina peningagávu á konto í Føroya Banka.

---

# Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Jona Djurhuus**
Morskranes (búsitandi í Havn)

andaðist og fór til gravar.

Ein serlig tøkk til allar tær mongu sjúkrasystrarnar og heimahjálparnar fyri ta umsorgan og røkt, ið tit góvu henni øll árini, hon var sjúk.

Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Børnini**



